# og onki ES



*Katrín Jakobsdóttir er næstformaður í Vinstra-grøna flokkinum og uppstillað í Reykjavík. Val er í Íslandi leygardagin 12. mai*

*Mynd: Carl Jóhan Jensen*

felagið sum er rindar fyri alla vælferðarskipanina við skatti, sum ríkiskassin fær av ovvøkstrinum. Lønarskatturin er lækkaður, gamaní, men stjórnin roknar við at fáa munaverdar inntøkur til tað almenna ístaðin við at skattleggja ovvøksturin, t.e. við at áleggja nýtslugjøld av ymsum slag. Ilt er kortini at vita, hvussu hesi gjøldini fara ávirka. Tey kunnu líka skjótt minka um nýtsluna í samfelagnum og tað so nógv, at búskapurin, sum vit siga, lendir harðliga ella fær eitt bakkast. Væntast kann í øllum førum, at tað verða tung tøk hjá komandi stjórn, at halda skil á búskapinum, um ovvøksturin, ið nú er, bráðkólnar og inntøkurnar hjá ríkiskassanum av nýtslugjøldum minkar samsvarandi, lønarskattin hava teir jú longu lækkað.

## Vælferð og skattur

*Eg skilji á lagnum, at umframt umhvørvið og náttúrvernd, seta tit vælferðina ovarlaga?*

- Ja, tað gera vit. Vælferðin er eitt hjartamál og vit hava ampa av tí ójavna, sum er í samfelagnum. Hann bara stendur við og veksur. Stórbroytingar eru sum kunnugt hendar í íslendska samfelagnum tey seinnu árini. Summi eru vorðin steinrík. Onnur eru við sviðusoð. Vit hava t.d. funnist at skattabroytingunum hjá sitandi stjórn. Hesar broytingarnar hava gjørt, at tey, sum eru lakast fyri, framhaldandi rinda sama skatt, meðan tey ríku afturímóti rinda minni í skatti. Tak eitt nú, hvussu fíggjarognarvinningur(t.e. rentuinntøkur, virðisbrævaágóði o.s.fr.) verður skattaður. Skattur av slíkum vinningi er sum er 10 prosent. Ein ávísur partur fólkinum, nógv tann ríkasti, hevur burturav inntøkur av fíggjarogn. Hesin samfelagsbólkurin rindar sostatt bara hesi 10 prosent í skatti og einki meira, heldur ikki kommunuskatt, meðan avlamisfólk noyðast at gjalda 37 prosent av pensjónini hjá sær.

*Er tó ikki eitt sokallað skattloysismark, sum ger at láglønt bert rinda skatt av einum upp á seg lít*lum parti av sínum inntøkum?

- Jú, men skattloysismarkið er 70.000 ísl. kr.um mánaðin og er ikki hækkað í hesum valskeiðinum. Nú skattloysismarkið hækkast upp í 120.000 til 150.000 ísl. kr., men tað er enn undir lágmarkinum, so bæði eldri og avlamisfólk t.d. verða framhaldandi skattað av sínum inntøkum.

## Fátækt og tannheilsa

*Men er vælferðin ikki á rímiliga høgum stigi í Íslandi kortini, sammett við onnur lond her um vegir?*

- Ein kanning, sum varð almannakunngjørd herfyri vísir, at nøkur túsund børn í Íslandi mugu metast at vera fátæk.

*Hvat meinar tú við fátæk?*

- Eg meini við børn úr heimum, ið hava inntøkur, sum eru undir einum tilskilaðum fátæktarmarki. Hesi børn luttaka ikki í frítíðarvirksemi, av tí at tað kostar, men hvaðna verri er, at mong børn ikki fáa líkinda tannrøkt, tí ráðini ikki eru til tað. Vinstri-grøni flokkurin hevur skotið upp, at tannlæknaviðgerð verður ókeypis fyri børn og ung eins og hon var heilt fram til 1998, tá ið skipanin varð avtikin. Av kappingarávum. Ókeypis tannlæknaviðgerð fyri børn og ung samsvaraði ikki við kappingarlóggávuna. Avleiðingin er, at tannheilsan hjá børnum og ungum nú liggur í koli. Hetta eru greiðar ábendingarnar, at mismunurin veksur.

## Útlendingar og innflytarakjak

*Nú hevur Frjálslyndi flokkurin (Frælslynti flokkurin) tikið útlendingaspurningin upp í valstríðnum og vil eftir øllum at døma fáa tiltøk framd til at avmarka talið av íslendingum, sum koma til Íslands. Hvat siga tit um tað?*

- Slíkum taka vit sjálvandi als ikki undir við. Teir standa nú eisini eitt sindur einsamallir við sínum sjónarmiðum. Fyri okkara part hava vit lítlan hug, álvaratos, at leggja okkum út í eitt kjak, sum skilliga ber brá av rasismu. Eftir okkara tykki ræður um at taka væl ímóti teimum, ið koma higar. Tak stóríðnaðaruppbyggingina. Nógvir útlendingar eru komnir higar at arbeiða í sambandi við hana. Innflytarar hava t.d. bygt Kárahnjúka-byrgingina. Vit íslendingar hava sjálv skapað ein eftirspurning eftir arbeiðsmegi í øllum vinnugreinum, tí ber ikki annað til enn at taka væl ímóti teimum, sum leita sær higar at arbeiða. Kortini hevur svíkur verið í nógvastaðni. Eitt nú hava innflytarar ikki fingið nóg góða undirvísing í íslendskum. Í øðrum norðurlondum t.d. Svøríki og Danmark fáa innflytarar tilboð um 2000 undirvísingartímar í ávikavist svenskum og donskum, her fáa teir 150 tímar í íslendskum. Og so gevur fólk ilt av sær og klaga um, at avgreiðslufólk í handlum og á matstovum ikki duga nóg væl íslendskt.

*Men útlendingar, sum koma higar, dvølja helst ikki longur enn teir hava arbeiði?*

- Tað er ymiskt. Tey, sum komu at arbeiða á Kárahnjúkum t.d., tey verða eyðvitað ikki verandi. Men

➘